**Skjal ZA**

**From:** Atli Suni Leo
**Sent:** Thursday, December 13, 2018 4:05 PM
**To:** Høgni Joensen <hognij@logting.fo>
**Cc:** Løgting <logting@logting.fo>; Kristina Háfoss <kh@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
**Subject:** Broyting til dagførdu inntøkumetingina til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2019

Til fíggjarnevnd Løgtingsins

Í dagførdu inntøkumetingini til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2019, dagfest 7. desember 2018, varð víst á, at inntøkurnar í 2019 frá fiskivinnuni enn vóru óvissar, tí endaliga lógargrundarlagið ikki var kent. Tískil varð metta inntøkuupphæddin á 355 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019, ið varð grundað á lógaruppskotið um veiðigjald, standandi óbroytt.

Nú er lagt fram løgtingsmál 83/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018 (Leingjan av heimild at taka veiðigjald).

Sambært lógaruppskotinum og galdandi lóggávu um Sjófeingi er metingin frá Fiskimálaráðnum, at inntøkurnar frá veiðigjøldum og uppboðssølum verða 321 mió. kr. í 2019. Samanborið við fíggjarlógaruppskotið fyri 2019 er talan um minniinntøkur á 34 mió. kr.

Dagførda inntøkumetingin, við rættingum, vísir meirinntøkur á 35,0 mió. kr. í mun til fíggjarlógaruppskotið. Samanlagt er tískil talan um, at inntøkurnar í fíggjarlógini fyri 2019 verða 1,0 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarlógaruppskotinum.

RLÚ úrslitið í fíggjarlógini fyri 2019, eftir dagførda inntøkumeting við rættingum og nýggja meting av inntøkum frá fiskivinnuni, og broytingaruppskot landsstýrisins, verður 404,6 mió. kr. í avlopi.

Vh Atli Suni Leo
Ráðgevi